

Stjórin í Statoil, Eldar Sætre, hevur sent eina millión krónur til hjálp í Nepal. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil gevur millión til Nepal-hjálpina

**Jógvan Hugo Gardar**

05.05.2015 - 08:51

Oljan.fo

Reyði Krossur fær eina millión norskar krónur frá Statoil til vanlukkuhjálp í Nepal, aftaná harða jarðskjálvtan leygardagin. Hetta hevur leiðslan í norska oljufelagnum boða frá.

Altjóða Reyði Krossur skal inn við enn meir hjálp til vanlukkurakta landið fyri at hjálpa teimum sum hava mist alt. Higartil eru fleiri enn 5000 fólk váttað deyð av jarðskjálvtanum, minst 10.000 hava fingið løstir, og nógv túsund fólk hava mist heim og bústað. Øll tey sum eru blivin heimleys búgva nú í teltlegum.

Flestu hjálparfelagsskapir luttaka nú í arbeiðnum at hjálpa í Nepal. Hjá føroyingum er møguligt at stuðla umvegis føroysku deildirnar hjá hjálparfelagsskapunum, millum annað á heimasíðuni hjá Reyða Krossi.